# Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 21. nov. 2024 kl. 16:00 – 17:30

**Á fundinum vóru:** Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Margith Lamhauge, Anna Maria Reinert Jensen, Malan á Dul Nielsen, Gunnvør Balle

**Ikki møtt:** Laila I. Hentze, Kristianna W. Poulsen

**Skrivari:** Anna Maria Reinert Jensen

**Skrá:**

1. **Skúlastýrisvalið**

   Tað var friðarval í ár, tí einans trý foreldur stillaðu upp til skúlastýrisvalið, og tørvur er á trimum foreldrum til skúlastýrið.Í komandi skúlastýri eru: Theodor Eli Dam Olsen, Mads Hoydal, Trygvi í Liða, Teir byrja 1. Januar 2025, og teur hava ikki skipað seg enn. Enn vita vit ikki, hvørjir býráðslimir verða í skúlastýrinum.

2. **Trivnaður/happing**

   Summir flokkar hava enn nokk so stórar avbjóðingar. Hvussu er við einari yvirskipaðari trivnaðarætlan? Hana hava vit ikki sæð enn, og tað er tí, at skúlin ikki er komin til at gera tað enn. Hví lækkar næmingatalið í hádeildini í mun til í grunddeildini? Tað er vert at hava í huga. Er tað nakað við trivnaðin at gera ella er tað serbreytir, sum er orsøkin? Gott samskifti við foreldur er alfa og omega undir øllum umstøðum.

3. **Næmingaráð**

   Gongd er í næmingaráðnum. Næmingaráðið í miðdeildini og hádeildini hevur verið á fundi og tosað saman. Ynskini eru nógv og summi ynski eru rættiliga reel. Næmingaráðið hevur eisini verið til tiltøk fyri næmingaráð, m.a. í NLH og í Skúlanum á Argjahamri. Vit hava fingið eina góða byrjan, halda vit. Tað, at skúlastýrið og næmingaráðið hittast er nakað, sum skal halda fram.

## 4. Skúlabygging og ferðsla

Tað er tað sama, sum tað hevur verið alla tíðina. Tað, sum fyllir mest í løtuni er, hvar børnini skulu hýsast, ímeðan skúlin verður bygdur.

- Gøtan vestarumegin verður ikki saltað av kommununi, og tað meta vit ikki er í lagi. Vit hava nógva ferðslu vestarumegin, og næmingar og starvsfólk ganga handa vegin, og tí skal hatta saltast.
- Vit hava eina ferð sæð eina tekning fyri ætlanini vestarumegin og gjørt viðmerkingar til, men hava einki sæð síðani